

# Kundi tú hugsað tær at arbeitt við ungdómi?

– so hava vit eitt avbjóðandi starv til tín

KFUM og KFUK søkja medarbeiðara, sum hevur hug at arbeiða millum ungdóm í einum fjølbroyttum kristiligum umhvørvi.

**Arbeiðið umfatar**
- leggja ungdómsarbeiðið til rættis
- skipa fyri tiltøkum fyri børn og ung
- røkja dagliga arbeiðið á skrivstovuni

**Vit vænta**
- tú ert álítandi og trúgvandi
- tú dugir at arbeiða við børnum og ungum
- tú kennir til sjálvboðið kristiligt arbeiði
- tú kanst samstarva við onnur
- tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- tú hevur áræði at taka nýggjar tættir upp

**Vit bjóða**
- eitt avbjóðandi og spennandi starv
- fjølbroyttar og mennandi uppgávur
- góð arbeiðsviðurskifti og góða løn

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til KFUM og KFUK á tel 31 19 28 ella fartelefon 21 18 24.

**Umsókn og freist**
Skrivlig umsókn við ummælum og skjølum skal vera okkum í hendi innan 4. juni 2007.

KFUM og KFUK í Havn eru tveir savnandi ungdómsfelagsskapir við nógvum virksemi fyri børn, ung & vaksin, sum umfram Várgleði og onnur tiltøk umfatar Sound of GloryTenSing, sum er kór, dans & drama. Sí meira á www.soundofglory.com

KFUM KFUK

**KFUM og KFUK**
Varðagøta 9
100 Tórshavn
tel 31 19 28

sozo

FISKIRANNSÓKNARSTOVAN
FAROESE FISHERIES LABORATORY

## Skipari til »Magnus Heinason«

Til »Magnus Heinason« verður søkt eftir avloysara fyri annan skiparan, sum fer í farloyvi 6. juni í ár. Starvið verður sett fyri 1 ár.

»Magnus Heinason« ger kanningar fyri Fiskirannsóknarstovuna, m.a. av havfrøði, æti, yngli, botnfiski, uppsjóarfiski og reiðskapi. Ein part av tíðini er skipið eisini til vanligan fiskiskap. Skiparin hevur, tá ið hann er umborð, høvuðsábyrgdina av skipinum, at tað uppfyllir øll krøv frá myndugleikum, klassa, trygging o.ø.

Skiparin skal hava hollar royndir og hava neyðuga útbúgving og vinnubræv og annars uppfylla øll krøv, sum vera sett av myndugleikum til tann, sum skal útinna starvið.

Setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag. Umsóknarfreistin er 29. mai 2007. Umsóknir við prógvum, yrkisgongd (curriculum vitae), viðmælum o.ø skulu sendast til Fiskirannsóknarstovuna, Postrúm 3051, Nóatún 1, FO 110 Tórshavn. Starvið verður sett skjótast til ber.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Fiskirannsóknarstovuna á tlf. +298 353900.



## Kunngerð

**Grunnurin til frama fyri samstarvi og fatan millum Nuuk - Reykjavík - Tórshavn**

Nú verður aftur møguleiki at søkja stuðul úr felagsgrunninum Nuuk - Reykjavík - Tórshavn. Ætlanin er í august mánaði at taka avgerð um veitan av stuðli.

Tórshavnar býráð heitir tí á einstaklingar, feløg o.o., ið halda seg koma undir treytirnar fyri stuðli, um at senda býráðnum umsóknarblað við frágreiðing um tiltakið, nær tað verður og um mettan kostnað. Hetta umsóknarblað fæst í Snarskivuni ella inni á heimasíðuni hjá kommununi.

Meiri fæst at vita um treytir við at venda sær til Jens M. Poulsen, kommunustjóra, tlf. 302010.

Umsókn merkt „Nuuk - Reykjavík - Tórshavn" eigur at vera Tórshavnar kommunu, postsmogu 32, 110 Tórshavn, í hendi seinasta lagi 16. juli 2007.

Býarstýrini Nuuk, Reykjavík og Tórshavn hava sett pening í grunnin, hvørs endamál er at veita fíggjarligan styrk til tiltøk ella annað, ið kann fremja og menna samstarvið og fatanina millum hesar kommunur og borgarar teirra.

**Les meira á www.torshavn.fo**

**Tórshavnar kommuna**

Húsamekling — www.husamekling.fo

*Keyp og søla av fastari ogn* — *tel 31 93 21*



**Vesturgøta 1, Tórshavn**
**Stødd á húsum:** 142 m² + úthús
**Stødd á grunddøki:** 110 m²
**Byggiár:** 1985
**Prísuppskot:** Kr 1.800.000,-



**Bjarnoyarvegur 12, Tórshavn**
**Stødd á húsum:** 86 m² + loft
**Stødd á grunddøki:** 320 m²
**Byggiár:** 1971
**Kostnaður:** Hóskandi boð ynskist



**Reynsgøta 7, Argir**
**Stødd á húsum:** Kj.: 100 m², miðh.: 100 m² + hjall
**Stødd á grunddøki:** 525 m²
**Byggiár:** 1983
**Kostnaður:** Hóskandi boð ynskist



**Hvarvið 3, Tórshavn**
**Stødd á húsum:** 109 m² x 2 + Hjall
**Stødd á grunddøki:** 448 m²
**Byggiár:** 1967
**Kostnaður:** Hóskandi boð ynskist



**Torkilsgøta 8, Hoyvík**
**Stødd á húsum:** 104 m² + loft á uml. 80 m²
**Stødd á grunddøki:** 248 m²
**Byggiár:** 2001
**Kostnaður:** Hóskandi boð ynskist



**Eiriksgøta 12, Tórshavn**
**Stødd á húsum:** 100 m² + hjall
**Stødd á grunddøki:** 240 m²
**Byggiár:** Uml. 1952
**Prísuppskot:** 1.800.000,-